# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Milson Berg sjeytifimm



Tann 7. november fyllir ein kendur suðuroyingur 75 ár. Útróðrarmenn úr Suðuroy hava seinastu árini í stórum talið leita norðureftir við bátum sínum í vártíðini. Sum postboð á Oyndarfjarðarrutuni, kom eg á hendan hátt at kenna nógvar suðuroyingar. Vanliga gjørdi eg ein túr oman á havnalagið, tá sjaskveður var og bátarnir lógu inni fyri veður, at heilsa upp á onkran og frætta fiskitíðindi. Var okkurt avlopsblað eftir í posttaskuni, so vóru teir sera fegnir um at fáa hendur á einari Dimmu, Sosialinum ella Oyggjatíðindi, og ferðaðist blaðið so millum bátarnar.

Ein av hesum monnunum var Milson Berg. Hóast høga aldur sín róði Milson út á Norðhavinum seinasta ár. At dríva útróður í einum lítlum glastrevjabáti í ivaveðri, krevur sín mann, men Milson ber aldurin væl og er lættur í sinni.

Milson hevur áhuga fyri samfelagsspurningum. Hann hevur orðið í síni makt og hevði uttan iva komið longur fram á politiska vígvøllinum, um royndin at skapa eina karieru innan hetta økið byrjaði á yngri árum.

Hann ger sína ávirkan galdandi, og regluliga verður undirritaði ámintur um truplu korini hjá heimaútiróðrinum, bústaðarviðurskiftunum hjá teimum eldru, og umbøn at seta fram uppskot og fremja tiltøk, til tess at bøta um fólkapensjónina.

Hjartaliga tillukku við føðingardegnum Milson og góðan byrð víðari fram á lívsleiðini.

**Kári P. Højgaard**

## Sofus Poulsen í Gallarí Ribarhús

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 8. november letur ein málningaframsýning hjá Sofusi Poulsen upp í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði.

Ferniseringin verður kl. 15, har Helgi Midjord stendur fyri tónleikinum.

Á framsýningini eru millum 15 og 20 spildurnýggir málningar, sum bera brá av listafólkunum Ruth Smith og Jóannesi Christiansen, og líkjast tí sum Ingálvur av Reyni málaði í 60-unum.

Hetta er fyrstu ferð at Sofus sýnir fram í Gallarí Ribarhús. Framsýningin er eisini tann fyrsta í eini røð av framsýningum í Føroyum og í Íslandi, har ein framsýning eftir ætlan verður næsta ár.

Framsýninginum hjá Sofusi heldur fram til 28. november. Opið er vanligar dagar, tá handilin í Ribarhúsi er opin, umframt sunnudagar frá kl. 15 til 18.



*Sofus Poulsen, listamaður*

**Dagurin**
**8. november. Claudius**, deyður umleið ár 300. Steinhøggari, sum saman við fýra øðrum steinhøggarum altíð risti kross í tey arbeiði, hann legði úr hondum. Tá ið hann og felagar hansara noktaðu fyri at høgga myndir av skurðgudum, læt keisarin Diocletianus teir taka av døgum.

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 80 ára degnum.

**Blíðar heilsanir**
**Poul Nolsøe Mikkelsen**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Kathrinu Hansen** úr Árnafirði, vanliga nevnd Trina, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsið mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Árnafjarðar Kirkju hósdagin kl. 13.30.

**Selinda Andrésson úr Tórshavn** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 72 ára gomul.

**Bent Olsen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 74 ára gamal. Bønarhald verður í Kirkjugarðskapellinum hósdagin kl 18. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin kl. 13.

Kistan við **Andreas Signar Dalfoss** fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl 19. Jarðarferðin verður Havnar kirkju hósdagin kl 13.

**Alborg Højgaard** av Toftum andaðist á eldrasambýlinum Vesturskyn mánadagin 99 ára gomul. Kistan kemur í Fríðrikskirkjuna í kvøld kl. 19. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Elisa Mathilda Joensen**
Vanliga nevnd Lisa hjá Skós
Klaksvík

andaðist mánadagin 5. november á Norðoyar Røktarheimi, 80 ára gomul.
Kistan fer úr kapellinum heim í kirkjuna fríggjadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.30.

*Fyri tey avvarandi*
**Elin við familju**

# Tøkk

Hjartans tøkk øll tit, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaða og kæra mamma, kona, omma og vermamma

**Berith Joensen**
Froðba

andaðist og varð jarðað.
Stóra tøkk fyri tær mongu heilsanir og til tykkum í bindiklubbanum fyri hjálpina til ervið.
Tøkk til familjuna fyri hjálp og stuðul, tíðina mamma lá so sjúk. Og til tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsið, fyri tykkara stuðul og røkt tíðina hon lá har og at tit gjørdu tað møguligt hjá henni at koma til Froðbiar at vitja aftur.
Tøkk til heimasjúkrasystrar og tykkum, ið vitjaðu mammu, bæði á sjúkrahúsinum og heima.
Tøkk til kirkjutænarar, berarar, sangarar og gravara. Tøkk til Jónsvein Bech, prest, fyri kenslurík orð og góða talu í kirkjuni.
Tøkk til Randi Nolsøe fyri tann vakra sangin.
Tøkk fyri blómur og kransar, heilsanir og peningagávur og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað á fold.

*Familjunnar vegna*
**Marit, Erling, Poul og Ingi**